Ílegusavnið Genetic Biobank

FARGEN FAROE GENOME PROJECT

## Vegleiðing til umsóknarblað

Niðanfyri sæst ein vegleiðing til, hvussu tú fyllir út umsóknarblaðið til Ílegusavnið um atgongd til FarGen-dátur. Allir teigarnir skulu fyllast út.

***Heiti á granskingarverkætlan:*** Skriva heitið á granskingarverkætlanini

***Umsøkjari****:* Skriva navnið á verkætlanarleiðaranum, PI (*principal investigator*), sum hevur ábyrgd av at fyrireika verkætlanina og greina úrslitini, og sum er kontaktpersónur fyri verkætlanina.

***Umsóknin viðvíkur****:* Set kross við, hvat slag av verkætlan talan er um. Setur tú kross við *"Annað"*, skriva hvat slag av verkætlan, tit arbeiða við.

***Stutt lýsing av granskingarverkætlanini****:* Greið í stuttum frá verkætlanini so sum endamáli, arbeiðshátti o.s.fr. Teksturin er ætlaður heimasíðu okkara.

***Granskingarleiðari****:* Skriva navnið á granskingarleiðaranum, SO (*signing official*), fyri verkætlanina. Granskingarleiðarin er ein leiðandi ábyrgdari við granskingarstovnin og tann, sum vegna granskingarstovnin er sáttmálapartur við Ílegusavnið í sambandi við eina granskingarverkætlan.

***Kliniskur ábyrgdarhavi****:* Skriva navnið á kliniska ábyrgdarhavanum, sum er eitt løggilt heilsustarvsfólk knýtt at føroyska heilsuverkinum.

***Aðrir limir í verkætlanarbólkinum****:* Skriva nøvnini á teimum, sum hava ábyrgd og munandi leiklutir í verkætlanini.

***Granskingarstað****:* Skriva staðið (stovnur og staðseting), har tú sum verkætlanarleiðari arbeiðir við verkætlanini?

***Tíðarætlan****:* Nær er ætlanin, at verkætlanin skal byrja, og nær endar hon.

***Fyribils heiti á ætlaðum vísindaligum útgávum****:* Skriva heitini á ætlaðum vísindaligum útgávum.

***Leitorð (key words)****:* Skriva leitorð, sum ætlandi verða brúkt í vísindaligu útgávunum.

***Hvat slag og hvør nøgd av dátum ynskjast úr FarGen-dátugrunninum?*** Skriva, hvat slag av dátum og hvussu nógvar dátur søkt verður um at fáa atgongd til úr FarGen-dátugrunninum.

***Skulu persónsupplýsingar flytast til útlond?*** Um persónsupplýsingar skulu flytast av landinum krevst serligt loyvi frá Dátueftirlitinum. Ílegusavnið søkir um loyvi frá Dátueftirlitinum vegna granskingarverkætlanina.

***Hjáløgd eru hesi skjøl**:* Skriva hvørji skjøl tú leggur við umsóknini. Tað kunnu eitt nú vera granskingarprotokoll, møgulig spurnabløð o.a.

***Dagfesting**:* Skriva dagfestingina tann dagin, umsóknin verður send.

***Undirskrift hjá granskingarleiðara**:* Granskingarleiðarin skal skriva undir.

***Undirskrift hjá kliniskum ábyrgdarhava**:* Kliniski ábyrgdarhavin skal skriva undir.